## Nýggj venjingarstøð í Miðvági

Í dag mánadagin letur nýgg venjingarmiðstøð upp í Miðvági. Arbeitt hevur verið í nakrar mánaðir at fáa alt klárt, og er nú loksins komið á mál. VEN eitur miðstøðin, og verður høvið hjá øllum at síggja umstøðurnar og heilsa upp á eigarar og starvsfólk millum kl 15 og 18 í dag mánadagin. VEN letur upp av álvara í morgin týsdagin kl 10, og ber tá til at tekna seg sum lim, og venja av álvara undir uppsýni av lærdum venjara. Hugsjónin hjá VEN er at øll, gomul og ung, løtt og tung, skulu sleppa at venja undir tryggum og góðum umstøðum. Dagligur leiðari verður Tróndur Ravnsfjall, ið eigur miðstøðina saman við John Arnfinn Reynstind.

## Adamskonsert kanska flytast

Ætlaða konsertin við Bryan Adams skal kanska flytast. Sosialurin hevur skilt, at tourmanagarin hjá Bryan Adams ikki góðtekur Skálatrøð sum spælistað, og at konsertin tí skal flytast. Tórsvøllur skal verða nýtt spælistað. Ein av fyrireikarunum, Dennis Holm, sigur tó, at loyvið, teir hava, umfatar Skálatrøð, og so leingi einki annað fyriliggur, fyrihalda teir seg til hetta.

# Fiskidagabanki veruleiki um eitt ár



*Longu næsta ár kunnu skipini byrja at fyrireika seg til ein fiskidagabanka*

**Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fer at brúka hetta næsta árið til at leggja lunnar undir ein fiskidagabanka, so at hann kann byrja at virka næsta summar**

FISKIDAGABANKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Um eitt ár hava vit fingið tann nógv umrødda fiskidagabankan.

Tað hevur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sett sær sum mál.

Hann sigur, at í løtuni situr ein nevnd og kannar, hvussu veiðitrýstið er í dag afturímóti tá ið fiskidagaskipanin varð sett í gildi.

- Endamálið við fiskidagaskipanini var, at hon skuldi vera sjálvregulerandi men nú skal so arbeiðið hjá hesi nevndini vísa, um tað veruliga er so, ella um veiðitrýstið í veruleikanum er økt.

Og tá ið fíggjarlógin fyri í ár er samtykt, fer hann at seta eina nevnd at gera tilmæli um broytingar í fiskidagaskipanina.

Ein partur av arbeiðnum hjá teirri nevndini verður at gera eitt ítøkiligt lógaruppskot um, hvussu ein fiskidagamarknaður kann gerast ein partur í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Og hansara mál er, at lógin skal verða sett í gildið næsta summar.

Men hann leggur dent á, at ætlanin er at byrja í smáum.

Í fyrstu atløgu er ætlanin bara at leggja øll tey veiðirættindini, sum ikki eru fevnd av lógini um vinnuligan fiskiskap, inn í fiskidagabankan.

Hetta eru tey rættindi, sum føroyinga eiga í fremmandum sjógvi.

Hinvegin ásannar hann, at fiskiloyvini kunnu ikki vera drigin inn fyrrenn í 2018 og fyrrenn tá ber ikki til at fáa fiskidagabankan at virka álvara.

- Vit fáa ikki ein effektivan fiskidagabanka, fyrrenn loyvini verða drigin inn í 2018 og tað er endamálið, hóast vit byrja í smáum næsta ár, sigur landsstýrismaðurin.

Annars hevur verið skotið upp at byrja longu í ár við at taka 1% - 2% av fiskidøgunum longu í næsta fiskiári, sum byrjar 1. september, og leggja teir inn í ein fiskidagabanka fyri at føla seg fram og vita, hvussu bankin virkar.

Men tað verður av ongum, sigur landsstýrismaðurin.

- Fiskidagabankin skal byggja á klettafast grundarlag, tí tað er avgerandi neyðugt, at vinnan altíð hevur tryggar karmar at virka undir og sostatt altíð veit, hvat hon hevur at halda seg til.

- Tí fara vit undir ongum umstøðum at seta nakað í verk í óðum verkum og sostatt fara vit heldur ikki at gera okkum inn á ta skipan, vit hava, leggur hann afturat.

# Eitt plettskot í sjónvarpinum

**Barnasendingin Rógvi og Drekin er besta føroyska barnasending í nýggjari tíð, sigur Sunneva Mohr, pedagoglesandi, ið sambandi við evnisarbeiði**

BARNASENDING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Barnasendingin Rógvi og Drekin, sum Páll Danielsen hevur gjørt í samstarvi við Kringvarpið, er eftir mínum tykki besta barnasending, ið er gjørd í Føroyum í nýggjari tíð.

Tað heldur Sunneva Mohr, nú flokkur hennara á Føroya Læraraskúla, hevur viðgjørt føroyskar fjølmiðlar og samskift millum børn við nútímas tøkni, tað veri seg SMS, tjatt ella blogg.

Hetta skrivar Birgir Kruse á *www.birkblog.blogspot.com*

Sunneva Mohr sigur, at nógv viðurskifti gera sendingina serliga góða.

Hon nevnir hugflogið, litirnar og ferðina á sendingini.

Men umframt at verða litrík, stuttlig og undirhaldandi, lærir hon børnini um lívið og ríkidømið í sjónum, sum flestu børn í Føroyum kenna nakað til.

Litirnir eru sterkir og tað er við til at fanga áhugan hjá børnunum. Hon heldur, at eisini er ferðin á sendingini hóskandi til aldursbólkin, tí gongur tað ov seint fyri seg, kann barnið skjótt keðast.

Somuleiðis er málburðurin góður og orðavalið er hóskandi til aldursbólkin, suim hon heldur, at sendingin er ætlað.

Hon heldur, at Rógvi og Drekin eru tveir fittir, stuttligir og litríkir "persónar", ið tú onkursvegna verður hugtikin av.

- At sendingin er gjørd og upptikin í Føroyum ger hana betri enn aðrar, heldur hon.



*Sunneva Mohr er serstakliga hugtikin av Rógva og Drekanum*